

## Henrik prinsur fyllir 75

Henrik prinsur fyllir 75 ár í dag. Føðingardagshaldið byrjaði í gjárkvøldið við stórari konsert í Keypmannahavn, har verk hjá prinsinum vóru á skránni. Í dag eru 75 ár, síðani Henrik prinsur varð borin í heim, og føðingardagurin verður hildin við ymsum tiltøkum allan dagin. Hátíðarhaldið byrjaði annars í gjárkvøldið við stórum tiltaki í konserthøllini hjá danska kringvarpinum, har bæði yrkingar og tónlistarverk hjá prinsinum vóru á skránni. Henrik prinsur var franskur greivi, áðrenn hann giftist Margretu krúnprinsessu í 1967. Hann hevur egnan víngarð í Fraklandi og hevur harumframt stóran áhuga fyri skaldskapi og afrikanskari list.

## Framvegis færri løntakarar

Í mars 2009 vóru slakir 25.000 løntakarar, hetta eru um 850 færri enn í mars 2008. Frá oktober 2008 til februar 2009 var støðug minking. Í februar vóru góð 3 prosent færri løntakarar, men tað tykist sum afturgongdin er steðgað. Í mars var afturgongdin framvegis 3 prosent. Tað er serliga innan fiski- og byggivinnuna at færri løntakarar eru. Í báðum bólkunum er afturgongdin yvir 10 prosent. Av teimum umleið 850 færri løntakarunum eru nærum 90 prosent mannfólk. Orsøkin er at tað er serliga innan fiski- og byggivinnuna at færri løntakarar eru. Hetta eru yrki har tað eru munandi fleiri mannligir løntakarar, skrivar Hagstovan.

# Atlantic Rhapsody - Ein dagur í Havn fyri 20 árum síðani

**Tá Tórsfagnaður verður í Havn tann 20. Juni, verða tvær serligar sýningar í Havnar Bio. Tá verður nevniliga fyrsti og einasti føroyskt fíggjaði spælifilmurin, Atlantic Rhapsody, vístur ummaftur. Í ár eru 20 ár síðan filmurin varð frumsýndur**

FILMUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




*Á myndini sæst Katrin Ottarsdóttir, filmsleikstjóri, við klapptrænum, ið varð brúkt undir upptøkunum av Atlantic Rhapsody*

- Vart tú við? Ella kanska systir tín? Mamma tín, pápi tín? Omma, abbi, gumma, stjórin, grannin?

Tórshavnar Kommuna bjóðar til sýningarnar í Havnar Bio tá Tórsfagnaður verður í Havn 20. juni 2009. Sýningarnar verða klokkan 15.30 og klokkan 17.15.

Tá fær tú møguleika at síggja løgmann sum stuntman, Budam sum smádrong, Elis áðrenn hann varð útvarpsstjørna, rektaran í Hoydølum sum ungan poet umframt mong onnur.

Atlantic Rhapsody er eitt slag av filmsstafett gjøgnum ein dag í Havn, har ein persónur, ein bilur, ein bóltur, ein telefonsamrøða ella eitthvørt annað førir áskoðaran frá einari senu til ta næstu.

Atlantic Rhapsody er fyrsti og higartil einasti føroyskt fíggjaði spælifilmurin, ein sonevndur low-budget-filmur, ið kostaði einans 1,7 milliónir at gera.

Tað er í roynd og veru óðamannaverk at gera film fyri so fáar pengar, men við treiskni og áhaldni og ikki minst við ómetaligari vælvild frá teimum fleiri enn 100 leikarunum, ið allir arbeiddu ókeypis, og frá havnarfólki annars og frá fyritøkum, stovnum og øðrum, ið uttan at blunka læntu filmsliðnum hús, bilar og annað, eydnaðist kortini at gera óðamannaverkið til veruleika.

### Yvirhálaði oscarvinnara í biografsýningum

Tá filmurin varð sýndur í Norðurlandahúsinum, Sjónleikarhúsinum og kring landið í 1989, fór maður av húsi í biograf. Við útivið 10.000 seldum atgongumerkjum yvirhálaði hann tey bæði stóru biografhittini tað árið , sum vóru Rambo og Oscarvinnarin Out of Africa.

Filmurin varð eisini væl fagnaður úti í heimi. Í Lübeck í Týsklandi vann hann fyrstuvirðislønina á árligu filmsstevnuni har, og hann varð sýndur á hópin av filmsstevnum um allan heim, bæði í Evropa, USA og Suðuramerika. Í Norra gjørdist hann kultfilmur í norsku filmsfeløgunum.

### Ikki øll líka fegin

Føroyingar vóru tó ikki allir so fegnir um filmin. Í einum lesarabrævið stóð millum annað hetta at lesa:

"Um ætlanin var at spilla Havnina út og sýna tað ljótasta og skammleysasta, ið filmast kann har og í Føroyum, so er tað eydnast væl. (...) Teir Føroyingar, eg havi talað við um filmin, hava ógvast við, hvat tey hava sæð og hoyrt og kalla filmin eitt skemdarverk."

Atlantic Rhapsody - 52 myndir úr Havn er spælifilmur eftir Katrina Ottarsdóttur. Filmurin, ið varir 75 minuttir, varð frumsýndur á norðurlendskari filmsstevnu, sum Filmsfelagið skipaði fyri í Norðurlandahúsinum í 1989. Atgongumerkjaprísurin fyri Atlantic Rhapsody í Havnar Bio Tórsfagnaðin 20. juni er 50 krónur.

Tiltøkini á Tórsfagnaðinum í Havn 20. juni 2009 eru partar av 100 ára haldinum hjá Tórshavnar kommunu.